# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kirkjan føroysk

Ólavsøkudag í ár verður fólkakirkjan føroysk, og hetta er einki minni enn ein stórhending. Í øldir hevur hesin týdningarmikli stovnur verið danskur. Í øldir sungu føroyingar sálmarnar á donskum og lýddu á danskar prædikur, sum teir lítið og einki skiltu av. Men sálmasongurin var tó serføroyskur, hóast málið var danskt. Við tí sonevnda kingosanginum, sum væl at merkja einki hevði við tann danska Kingo at gera, skaptu okkara forfedrar ríkan mentanararv.

Men nú verður kirkjan so føroysk, og hetta er sjálvsagt ein liður í tí stigvísu sjálvstýristilgongd, sum tað í løtuni er breið semja um á løgtingi. Tað tykist eisini at vera breið semja um kirkjuyvirtøkuna, og tað eiga øll, sum eru góð við kirkjuna at fegnast um. Yvirtøkan av kirkjuni leggur stóra ábyrgd á herðar landsstýris-, løgtings- og kirkjuliga umhvørvinum. Kirkjan er sera týðandi stovnur í samfelagnum, og hon hevur ómetaligan týdning fyri samleikan hjá øllum føroyingum uttan til, hvar teir annars átrúnaðarliga hoyra heima. Vit ivast ikki í, at føroyingar fara at megna at varðveita og menna kirkjuna til gagns fyri alla tjóðina.

Av lóggávuni um yvirtøkuna gongur fram, at kongshúsið, sum er kongshús allra ríkisborgara, framyvir fer at hava ávíst tilknýti til føroysku kirkjuna. Hetta ynskja ivaleyst flestøll kirkjufólk eisini. Drotningin er hægsti kirkjumyndugleiki í Danmark, meðan løgmaður verður okkara hægsti kirkjumyndugleiki. Tað er tí bæði løgið og harmiligt, at hvørki drotningin ella nakar av húsi hennara hevur hirt at koma til Føroya í sambandi við yvirtøkuna. Hetta er spell, tí hevði kongshúsið verið umboðað á Ólavsøku, so hevði hetta undirstrikað, at yvirtøkan er farin fram í sátt og semju. Nú tey kongaligu halda seg burtur, kann hetta bert tulkast sum eitt tekin um firtni: teir illavornu føroyingarnir hava tikið kirkjuna frá okkum, og tí sita vit við hús! Hetta er ikki gott, men vit eiga tó ikki at lata hetta sleppa at kasta skugga yvir hátíðarhaldið, sum skal verða ein fagnað- og ein gleðishátíð.

**Sosialurin**

## Er landsverkfrøðingurin politikkari?

**BILL JUSTINUSSEN**
løgtingsmaður



Nú var landsverkfrøðingurin aftur úti við einum politiskum tilmæli. Hesuferð snúði málið seg um at leggja tunlar saman við fíggjarligum fyrimuni fyri landskassan. Uppgávan hjá Landsverki er at veita landsstýrinum tøkniliga ráðgeving í sambandi við útbygging og viðlíkahald av undirstøðukervinum. Men Landsverk er hvørki politiskur ella fíggjarligur ráðgevi. Og tí er stovnurin við sínum seinasta uppriti farin út um sína uppgávu. Sjálvandi kann Landsverk eins og øll onnur hava loyvi at mistaka seg, men hetta er tíverri ikki fyrsta dømið. Tí er neyðugt at átala landsverkfrøðingin. Tað hevur stóran týdning, at landsverkfrøðingurin heldur seg til tað, sum er hansara uppgáva, tí um hann ov ofta úttalar seg politiskt, verður truplari hjá okkum politikkarum at hava álit á hansara tøkniligu ráðgeving.

Við tíðini eru tað fleiri tekin, sum benda á, at landsverkfrøðingurin ikki er serliga fegin um Skálafjarðartunnilsverkætlanina. Vónandi meti eg skeivt, tí tað er sera neyðugt, at Landsverk er viðleikari í hesari ovurstóru verkætlan. Men tá hann fyrst skýtur upp at gera brúgv um Skálafjørðin og síðani, í beinleiðis mótsøgn við aðrar verkfrøðingar, mælir frá at gera rundkoyring í tunlinum og nú roynir at fáa eysturoyingar, norðoyingar og sandoyingar einsamallar at gjalda báðar tunlarnar, so tykist hann alt meiri at avdúka sín illvilja. Um vit skulu viðgera tankan hjá landsverkfrøðinginum – og lat meg siga, at eg einans havi tíðindini í fjølmiðlunum at halda meg til – skal sandoyartunnilin fíggjast við yvirskoti av skálafjarðartunlinum. Hetta er ein sera góður leistur fyri tey, sum búgva í miðstaðarøkinum, tí tað verður í minni mun tey, sum koma at nýta skálafjarðar- og sandoyartunnilin. Tað eru í høvuðsheitum tey uttan fyri Havnina, sum verða stórbrúkarar av tunlunum báðum. Ferðslan gongur til Havnar um morgunin og úr aftur Havnini um kvøldið, tí vit hava ein høvuðsstað, sum veksur stútt og støðugt, og alt fleiri tilboð, tænastur og arbeiðspláss eru har.

**Fleiri vansar eru við uppskotinum hjá landsverki:**
Uppskotið er ósamhaldsfast, tí tey, sum fara at brúka Skálafjarðartunnilin, koma at gjalda ein yvirprís uttan at fáa nakað afturfyri og tey, sum búgva í miðøkinum sleppa undan at gjalda Sandoyartunnilin yvir skattin. Uppskotið er ikki sambæriligt við løgtingssamtyktina um Skálafjarðartunnilin og er longu nú í ferð við at seinka verkætlanini – ikki ólíkt vanlukkuligu gongdini í sambandi við vegaføringina í Leirvík. Uppskotið kemur at dýrka gjaldið gjøgnum skálafjarðartunnilin so mikið, at fólk møguliga fara at ivast í at nýta verandi farleið í staðin. Uppskotið snýr seg um fígging og politikk, og liggur tí uttan fyri virkisøkið hjá Landsverk.

Samanumtikið er uppskotið til lítlan sóma fyri Landsverk, og er til størri skaða enn gagn fyri bæði skálafjarðartunnilin og sandoyartunnilin.

Eg fari at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at arbeiða skjótt við ætlanini um skálafjarðartunnilin eftir tí leisti, sum hann bað Løgtingið um at samtykkja, og síðani at koma við eini skilagóðari loysn í sambandi við sandoyartunnilin. Og so fari eg at heita á landsverkfrøðingin um at nýta sína orku til at ráðgeva um skilabestu tøkniligu loysnirnar uttan mun til, hvat vit politikkarar annars meina.

## Hvussu nógv kostar ein undirsjóartunnil?

**EYÐUN MOHR VIDERØ**



Hvussu nógv gevur tað, at hava Sandoynna við í einum vinnuligum inntøkugevandi Føroyum við góðum samferðslukervi? Ella hvussu nógv kostar tað at avfólka Sandoynna?

Sjálvsagt eiga vit at meta um tær stóru íløgurnar, hvussu nógv skulu vit nýta til stóra samferðslukervið, og hvat vit klára at standa við, tá á stendur. Seinasta boð frá okkara fermstu "klóku" fólkum, er, at politikarin Magni Laksafoss sleppur politisku uppgávuni og førir búskaparpolitikk, meðan tænastu/búskapararbeiðarin Oyvindur Brimnes sleppir búskapinum og førir politikk!

Fyri ikki at tala um formannin í mínum felag Ingeborg Winther, sum fer í, sum hon heldur, "skilagott" samstarv við Magna Laksafoss um búskaparpolitikk.

Ingeborg eigur at vita, at ætlaða útseting/sparing av undirsjóartunnli til Sandoynna tænir teimum háløntu og fastløntu í umsitingini, meðan arbeiðarin millum annað í Sandoynni fær minkandi møguleika at virka í framleiðsluvinnuni, og harvið minkar grundarlagið undir felagi og áhugamálunum hjá okkara formanni. Men hjá henni er tað kanska eisini stórfingið at sleppa at sita ímillum tey vælbjargaðu/klóku og føra "búskaparpolitikk"!

Sandoyggin stendur á einum vegamóti fyri at yvirliva, tí samferðslukervið í øðrum pørtum av landinum eru so væl útbygd nú, at um Sandoyggin ikki sleppur við, so er deyðin í durunum!

Viðvíkjandi uppskotinum at leggja tunnil frá Skálafjørðinum og til Sandoynna í eitt búskaparligt felag má skiljast soleiðis, at leiðarin á Landsverk metir hesi arbeiði sum "luksusprojekt", ið tey sjálv mugu fíggja og "spæla" sær við, meðan vit onnur rokna hetta sum eina náttúrliga útbygging av Føroyum, og tí skal hetta roknast sum ein landsuppgáva.

Nú er bert at vóna, at okkara politikkarar kenna sína ábyrgd fyri landi og fólki og fremja ta ætlan, ið vit hava fingið at vita um raðfestingina av Sandoyartunnlinum aftaná Norðoyatunnilin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.